# Stórtítan snýtti fuglafrøðingarnar

**Stórstrítan, sum vigaði 17 gram, og sum í síðstu viku fekk mikla umrøðu, tí hon hevði flogið úr Danmark til Føroya, lumpaði fuglafrøðingarnar. Hon kom til Føroya við Norrönu…**

FUGLAR
*Eirikur Lindenskov*

Fríggjadagin skrivaðu vit um eina stórtítu (dk: musvit), sum hevði sett met við at flúgva úr Danmark til Føroya.

Tað var Zoologisk Museum í Keypmannahavn, sum sendi út eitt tíðindaskriv, eftir at Jens Kjeld Jensen í Nólsoy hevði fingið ringmerkta fuglin í fuglafelluna í Nólsoy.

Men hesin lítili og fitti fuglurin, ið einans vigaði 17 gramm, hevur lumpað fuglafrøðingarnar so eftirtrykkiliga.

Danska gratisavísin, Urban, skrivar í dag, at ein ferðamaður hevur sæð fuglin umborð á Norrønu á veg úr Hanstholm til Føroya tann 12. apríl.

Urban hevur spurt Jesper Johannes Madsen á Zoologisk Museum, og hann svara skelkaður:

– So hevur hann snýtt okkum…!



*Hesin lítli fitti fuglurin lumpaði fuglafrøðingarnar so eftirtrykkiliga. Teir hildu, hann hevði sett met, tí hann hevði flogið til Føroya. Nú vísir tað seg kortini, at hann er komin til Føroya við Norrönu – og hevur flogið um Nólsoyarfjørð…*


summarið 2003

Shetland Cruise

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag

Gisting á hotelli
úr 1.289,-

Gisting á vallaraheimi
úr 893,-

Privat gisting
úr 1.018,-

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo

SMYRIL LINE
the North Atlantic Link










# Kamilla vann sangkappingina í Havn

**Kamilla Ravnsfjall vann í næstseinasta umfarinum av kappingini um at gerast ársins songrødd 2003**



SONGRØDD
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið var næstseinasta umfarið av Ársins Songrødd 2003. Vinnarin hesaferð var Kamilla Ravnsfjall, og nr.2 bleiv Rúna á Rógvi Simonsen. Tær báðar verða millum finalistarnar ið verða at hoyra tann 24. mai í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Seinasta umfarið verður leygarkvøldið 17. mai í Klaksvík, og tað verður í KÍ høllini.

Eisini har er fulteknað.

# Kári innstillaður

**Kári Sverrisson innstillaður til tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins**

TÓNLEIKAVIRÐISLØN

Norðurlandaráðið kunngjørdi mánadagin nøvnini á teimum, ið eru innstillað til tónleikavirðislønina í ár

Hesi eru innstillað: Úr Danmark: Pierre Dørge & The New Jungle Orchestra Outlandish, úr Finnlandi: Kimmo Pohjonen Gjallarhorn, úr Føroyum: Kári Sverrisson, úr Grønlandi: Anna Kuitsi, úr Íslandi: Duo Sigurður Flosason og Pétur Grétarsson, úr Noreg: Mari Boine og Solo Cissokho, úr Svøríki: Ellika Frisell og Ziya Aytekin.

Virðislønin er upp á 350.000 krónur, og verður latin á norðurlandaráðsfundinum seinast í





# Søktu um loyvi til at jarða eitt lík

**Arbeiðarafeløgini, sum eru í verkfalli, eru um at drukna í umsóknum um undantaksloyvi til alt ímillum himmal og jørð**



VERKFALL
*Áki Bertholdsen*

– Eitt lík sum skal jarðast.

– Ein pylsuvognur, um manglar ketsjupp og sinnopp.

Hetta eru bara tvey av málunum, sum arbeiðarafeløgini, ið eru í verkfalli, hava verið noydd til at taka støðu til hesa vikuna, verkfallið hevur lagt alt landið lamið.

Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at feløgini í verkfalli eru um at drukna í umsóknum um undantaksloyvi til alt ímillum himmal og jørð.

Dømini omanfyri eru bara tvær umsóknir burturúr rúgvuni, sum feløgini hava tikið støðu til.

Svarið uppá tað fyrru umsóknina var ja.

– Tað eru býttheitir at biðja um undantaksloyvi til at jarða lík. Sjálvsagt fer ongin at nokta einum menniskja at sleppa í jørðina, sigur Ingeborg Vinther, so tað er óneyðugt at biðja um slíkt.

Hinvegin verður kanska heldur turrligt at eta úr pylsuvogninum, tí spurningurin er, um hann fær útvega sær ketsjupp og sinnopp, so leingi verkfallið er.

Annars sigur Ingeborg Vinther, at feløgini hava eisini fingið umsókn um at geva undantaksloyvi til vøggustovur, barnagarðar, skúlar og aðrar stovnar, so tey sleppa at vaska á stovnunum fyri at sleppa undan at lata teir aftur.

Tað sleppa tey heldur ikki og tískil eru allir dagstovnar og skúlar antin stongdir, ella verða tað fyrsta dagin.

Ingeborg Vinther sigur, at skal verkfallið verða so effektivt sum gjørligt, er tað umráðandi, at undantøkini verða so fá sum gjørligt og sostatt er tað at kalla bert neyðsynjararbeiðið, sum sleppur at halda fram ótarnað, eitt nú á sjúkrahúsum, ellis- og røktarheimum o.s.fr.

Og neyðsynkararbeiðið umfatar eisini arbeiðið at taka deyðan fisk í onkrum alibrúki, sum er rakt av sjúku. Men fiskurin skal leggjast á frystigoymslu, hann skal ikki frystast.

Og so sleppa skipini hjá Strandferðsluni og Norrøna at sigla, eins og mjólkarflutningurin og -arbeiðið at mjólkarvirkinum heldur ikki er steðgað.

## Onki samband

Annars er onki samband ímillum arbeiðsgevararnar og arbeiðarafeløgini í verkfalli.

Ingeborg Vinther sigur, at tey hava ikki hoyrt frá semingsmonnunum enn.

Men hon heldur lítið um at lønarkrøvini í Føroyum verða samanbornar við lønarkrøvini uttanlands, sum eru nógv lægri.

–Hetta kann ikki samanberast. Tá ið sosialir ágóðar og aðrar sømdir, sum eru í grannalondum okkara, verða tald við, er lønin væl hægri enn í Føroyum, sigur Ingeborg Vinther.




FARMAKONOMAR

Apotekið í Havn hevur brúk fyri 2 farmakonomum í eitt ár, at byrja skjótast gjørligt.
Møguleiki er eisini fyri at fáa arbeiði í styttri tíðarskeið.

Vit vænta:
At tær dámar at avgreiða viðskiftafólk
At tú ert álitandi og arbeiðsom
At tú hevur góð samstarvsevni
At tú arbeiðir sjálvstøðugt

Vit bjóða:
Gott arbeiðsumhvørvi
Góðar starvsfelagar
Fjølbroytt arbeiði
Fulltíðarstarv

Løn eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Farmakonomfelagið.

Meiri fæst at vita við at ringja til apotekið á tlf.: 34 11 00 og spyrja eftir Petur Oluf Joensen.

Skrivlig umsókn saman við Farmakonomprógvi, CV og møguligum ummælum skulu sendast til:

Tjaldurs Apotek
Postboks 3010
110 Tórshavn